FYLGI LM-114/2020

Undirvísingarstýrið

+ 298 200 900
undirvising@uvs.fo
Hoyviksvegur 72, 100 Tórshavn
www.undirvising.fo

Uttanríks- og mentamálaráðið

27. januar 2021

Hoyringssvar til uppskotið um KT-heildarloysn til undirvísingarverkið

Undirvísingarstýrið fegnast um, at lógaruppskot til verklagslóg nú verður lagt fram. Tað hevur stóran týdning, at arbeiðið av álvara kann byrja skjótast tilber.

Uppskotið til verklagslóg gevur landsstýrismanninum heimild at brúka 40 mio. kr. til heildarætlanina.

Fíggjarkarmurin, hvussu íløgan vera deild yvir ár, er ikki partur av verklagslógini, men er ásett í fíggjarlógini og langtíðar løgukarminum. Lógaruppskotið hevur viðmerkingar ið samsvara við fíggjarlógina fyri 2021 og løgukarmin.

Undirvísingarsstýrið vil vísa á, at rættast var, um fíggingin til verkætlanina var frá 2021 til 2024, soleiðis sum heildarætlanin eisini mælir til og ikki frá 2021 til 2025, soleiðis sum fíggjarkarmurin ásetir, og viðmerkingarnar til lógaruppskotið siga. Tað eru serliga tvinnar orsøkir til hetta.

1) Verðandi skipanir lúka ikki galdandi trygdarkrøv, og óvissa er um, hvussu leingi raksturin av summum av hesum skipanum kann halda fram. Tað hevur skund at fáa eina nýggja skipan verksetta.
2) Tess longri tíðarskeiðið er, har menningin av eini nýggjari skipan fer fram, tess longur skulu vit hava fleiri skipanir í rakstri. Hetta kann skapa ørkymlan fyri brúkarar, tí fleiri skipanir skulu vera í brúki samstundis í longri tíð, og raksturin verður dýrari.

Undirvísingarstýrið mælir til, at tann lagdi fíggjarkarmurin verður endurskoðaður í samsvar við heildarætlanina, ið var handað landsstýrismanninum 4. september 2020.

Vinalig heilsan

Hjalmar Hansen
stjóri